# Bill og konufólkini




**KRISTIANNA WINTHER POULSEN**

forkvinna í Javnstøðunevndini


Bill Justinussen førdi í farnu viku av tingsins røðarapalli fram, at søgulig fakta eru syrgilig, tá ið talan er um kvinnur í politikki. Tí har sum kvinnur hava verið uppií, hava verið tiknir upp spurningar sum liberalisering av rúsdrekkalóggávu, 266b og fosturtøka. Í sama viðfangi sigur hann seg vera øgiliga ivasaman í, um tað altíð er rætt at fáa kvinnur at taka lut í politikki.

**Siðspilla?**

Um spurningar sum liberalisering av rúsdrekkalógini, menniskjarættindi hjá minnilutabólkum og politisk viðgerð av fosturtøkulóggávuni, ið er frá 1959, veruliga eru skaðiligir fyri okkara samfelag, má hvørt einstakt menniskja taka støðu til. Sjálv eri eg sannførd um, at slíkir spurningar eru viðkomandi fyri nógv menniskju, sum búleikast ella ynskja at búleikast í Føroyum. Og at politikarar eru, sum taka hesar spurningar upp til viðgerðar, er eitt tekin um, at politiska kjakið gerst alt fjølbroyttari og í alt betri samsvari við okkara samtíð og við tað, sum rørir seg í einum samfelag í 21. øld.

**Álvaratos ella ørvitistos?**

Tað er ikki hvørt gildi, tú skalt fara til og hvørt orð, tú skalt svara til! Útsøgnir sum tann hjá Bill Justinussen um, at konufólk í politikki standa fyri eini vandamiklari politiskari kós, eru ikki eyðsæddar at svara uppá, tí at tær eru so burturi úr vón og viti, at her flættast ikki við.

Vit sóu í Degi og Viku mánakvøldið 27. oktober, at bæði Bill Justinussen sjálvur og konufólk í Miðflokkinum bóru í bøtuflaka fyri tí, sum hann hevði ført fram av tingsins røðarapalli 22. oktober. Spurningurin er, um hetta merkir, at eingin orsøk er til at taka tað, sum Bill Justinussen sigur í tinginum, í álvara.

**Kamartónin**

Okkara háttvirda løgting hevur eina tingskipan, har ásett er, hvussu arbeiðið í tinginum eigur at fara fram. Sambært hesi tingskipan er ein av uppgávunum hjá formanninum at ansa eftir, at alt er í góðum skili, og at viðgerðin er virðilig. Vanliga fáa tingfólk átalu, tá ið tey av tingsins røðarapalli gera so álvarslig mistøk sum at umtala onnur tingfólk við fornavni ella venda sær beinleiðis til onnur tingfólk uttanum formansskapin. So tað undrar stórliga, at ikki eitt kis var at hoyra haðani eftir orðafloymin frá Bill Justinussen, sum eftir mínum tykki var alt annað enn virðiligur.

**Javnstøða – eisini í politikki**

At útsøgnir, sum seta spurnartekin við politiska førleikan og moralska skynið hjá føroyskum konufólki, sleppa óátalaðar gjøgnum formansskapin, sigur okkum ein heilan hóp um arbeiðsumstøðurnar hjá hinum kyninum á Føroya løgtingi. Og tað sigur okkum enn meira um, hvussu stóran týdning javnstøða millum kyn hevur í politikki.

Við øktari javnstøðu í føroyskum politikki fáa slíkar avoldaðar og niðrandi útsøgnir eitt skikkað mótspæl. Slíkt mótspæl er neyðugt, soleiðis at karmarnir um føroysku tilveruna kunnu mennast fyri at rúma øllum teimum menniskjum og øllum teimum viðurskiftum, sum skulu til, fyri at vit sum land og sum fólk við fortíðini sum grundarlagi skulu megna at lofta samtíðini fyri at koma væl inn í framtíðina.

# Stívliga 300 bátapláss í umbúnað




**LEIVUR HANSEN**

býráðslimur og valevnI á Lista E


Tørvurin á bátaplássum í Tórshavnar kommunu hevur verið støðugt vaksandi seinastu árini, og íalt munnu útivið 300 umsóknir liggja hjá kommununi í løtuni um bátapláss.

Sum er eru 654 teymar og brúgvapláss í kommununi: 526 í Havn og á Argjum, 74 í Kollafirði og á Signabø, 13 í Kaldbak og Kaldbaksbotni, 25 í Nólsoy og 16 í Hesti.

10 bátapláss eru tøk í løtuni, 6 í Hesti og 4 í Nólsoy. Í øllum hinum plássunum er tørvur á bátaplássum: 265 í Havn/Argjum, 8 í Kollafirði/Signabø og 9 í Kaldbak/Kaldbaksbotni.

Á Hvítanesi, í Hoyvík, á Velbastað, í Kirkjubø og Norðradali eru eingin beinleiðis bátapláss, men har er lending og privat neyst. Í Syðradali er hvørki lending ella neyst.

**Gamlarætt**

Í sambandi við at Kirkjubøar kommuna í 2005 legði saman við Tórshavnar kommunu, søkti Tórshavnar havn Landsverk um loyvi at hava bátapláss á Gomlurætt, men fekk noktandi svar.

Tó fingu vit loyvi - fyri eitt árligt gjald upp á 20 tús. kr. - at hava eina flótibrúgv liggjandi har til bátar, ið sigla við ferðafólkum millum Gomlurætt, Hest og Koltur.

Sum grundgeving fyri ikki at vilja eftirlíka umsóknini um onnur bátapláss, vísti LV m. a. á, at hetta fór at darva skiparunum á Teistanum at fáa lagt skipið at bryggju.

Tí undrar tað meg eitt sindur nú at lesa í Sosialinum (28/10-08), at skipari á Teistanum verður endurgivin fyri at siga, at teir als ongar trupulleikar hava av bátunum, sum í áravís hava ligið har, men sum LV nú brádliga vil hava burtur við sera stuttari freist.

Annars er skipanin viðvíkjandi bátaplássum tann, at borgarar á plássum, har eingin bátapláss eru, kunnu søkja um bátapláss á nærmasta staði. Kirkjubøur, Velbastaður og Syðradalur hoyra í hesum sambandi til Tórshavn/Argir og Norðradalur til Kollafjørð/Signabø.

**Langtíðarætlan gjørd**

Til tess at nøkta tørvin á bátaplássum í kommununi hevur Tórshavnar býráð í einari langtíðarætlan gjørt av at seta 5 mió. kr. av um árið til útbygging av smábátahavnum/smábátaplássum.

Sambært ætlanini, ið fevnir um stívliga 300 bátapláss íalt og sum er mett at kosta millum 50 og 60 mió. kr. tilsamans, skulu 90 bátapláss útvegast aftrat á Argjum, 150 í Álakeri, 23-43 í Gomlurætt og 50 pláss í verandi bátahyli á Signabø.

Ætlanin er at byrja á Argjum (umsókn um loyvi liggur hjá yvirfriðingarnevndini). Næst í røðini er Álaker, síðani Gamlarætt og at enda Signabøur. Raðfestingin er gjørd eftir, hvar tørvurin á bátaplássum er størstur.

**Bátapláss á landi**

Støðan við bátaplássum á landi líkist nógv støðuni við bátaplássum á sjónum, og tí verður eisini arbeitt við at útvega fleiri bátapláss á landi, herundir eisini at leiga út til vetrarparkering av bátum, eins og parkering av bátavognum.

Samanumtikið ein stór, umfatandi, men neyðug ætlan, skulu vit megna at nøkta tørvin á bátaplássum og harvið eisini økja um trivnaðin hjá tí alsamt vaksandi hópi av borgarum, sum hevur hetta sum frítíðarítriv.

Vísir tú mær álit á býráðsvalinum týsdagin 11. november, kanst tú vera vísur í, at hesar ætlanir ikki enda í eini skuffu eftir valið, men tvørturímóti verða framdar í verki eftir omanfyri nevnda leisti.

# Ein ella tvær tíðindadeildir í Kringvarpinum




**SOFUS DEBES JOHANNESEN**


Hugdi eftir kjakinum í SVF hetta kvøldið, kringvarpslógin var til viðgerðar.

Løgin sending, ið eftir mínari meting undirstrikar týdningin av, at Kringvarpið eigurr at hava strangar reglur at ganga eftir, ella onnur skipan eigur at vera roynd.

Tí hvørgin av politikarunum, ið vóru við í sendingini, vóru við at samtykkja lógina um Kringvarpið. Var tað av tilvild, ella av bráddum huga?

Eg haldi ikki, at handan sendingin borgar fyri tí neyðuga óheftni ella margfaldni í tíðindaflutninginum, ið vit eiga at krevja av Kringvarpinum sum einasta almenna public service stovninum i Føroyum.

Var tað eitt hvørt annað evnið, ivist eg ikki í, at Kringvarpið hevði viðgjørt tað væl meira kritiskt. Hvussu hevur Kringvarpið ikki tugt og tanlað summi tilvildarlig tíndini í eina heila viku, tá talan hevur verið um onnur evnir? Men hesa ferð var tað teirra egna verð, var tað tí, at kritiska røddin ikki kom til orðanna?

Eg skal tó viðganga, at tað kanska ikki er rætt at løggeva, at Kringvarpið hevur tvær óheftar tíðindaredaktiónir, men samskipar arbeiðskreftirnar fyri at fáa sum mest burtur úr, so vit ikki hoyra og síggja somu tíðindini í báðum miðlunum sama kvøld.

Men so má spurningurin setast: Hvussu tryggja vit okkum so margfaldni í loftbornu miðlunum?

Her eru eftir mínari meting tveir møguleikar:

Antin nokta almenna Kringvarpinum at hava kunngerðir og handilslýsingar, soleiðis at alternativir miðlar (í løtuni Rás 2-radio- og Rás 1-televarp) kunnu nýta hesar inntøkumøguleikar at skapa Kringvarpinum kapping.

Ella at veita Rás 2 og Rás1 fíggjarligan stuðul, so hesi kunnu vera við í kappingini framyvir.

Tí kapping krevst, skulu vit hava munadyggar loftbornar miðlar!

Eg eri vísur í, at endar tað við, at Rás 2 bukkar undir fíggjarliga (og Rás 1 hjá Televarpinum eisini), so stendur ikki so væl til við bert einum Kringvarpi við einari tíðindaredaktión.

At enda skal eg siga, at eg eri glaður fyri, at Helena Dam á Neystabø, mentamálaráðharri, í omanfyri nevndu sending segði, at hon vildi lata allar partar – eisini teir løgtingslimir, ið gjørdu lógina um Kringvarp Føroya – koma til orðanna, áðrenn hon ger sinar niðurstøur í hesum týdningarmikla máli.

www.sosialurin.fo